## Smábygdirnar ganga fram

Í seinastu hagtølunum frá Hagstovu Føroya síggjast fólkatalið í ymisku bygdunum í Føroyum og í Føroyum samanlagt. Alt landið samanlagt, eru ikki stórvegis broytingar millum september 2007 og september 2008. Í september 2007 búðu 48.315 fólk í Føroyum, og í september 2008 búðu 48.642 fólk í Føroyum, also ein vøkstur á 337 fólk. Mest áhugaverda broytingin er tó at síggja í smærru bygdunum. Í Æðuvík gjørdust bygdafólkini 12 meira í tali, frá 97 til 109 fólk, og er tað ein vøkstur á 12,4 prosent. Á Norðoyri gjørdust tey 9 fleiri, frá 82 til 91 fólk, og er tað ein vøkstur á knøpp 11 prosent. Í bæði Sandavági og Sørvági búðu fleiri fólk í 2008, meðan talið minkaði í Miðvági. Tórshavn stendur mestsum í stað, bert 64 fólk fleiri.

## Loppumarknaðurin hjá Reyða Krossi verður leygardagin

Loppumarknaðurin hjá Reyða Krossi Føroya í vetur verður leygardagin hin 22. novembur frá klokkan 10 til 15. Tá verður tað møguligt í Reyða Kross húsinum á Bryggjubakka í Vágsbotni at keypa millum annað alskyns lutir, bøkur og góð, brúkt klæðir. Pengarnir frá søluni fara til arbeiðið hjá Reyða Krossi Føroya at bjarga lívum úti í heimi, har ið fólk eru í djúpari neyð. Umframt hetta verða pengarnir nýttir at stuðla millum annað einsamøllum, sjúkum og øðrum í neyð.



*Seinastu tveir túrarnar hava Vestmenningur og Fram fiskað ávikavist 640.000 og 540.000 pund og hava selt fyri tilsamans 3,7 miljónir krónur*
*Mynd: Karstin Vang*

# Hava fiskað fyri 33 miljónir í ár



*Vestmenningur og Fram (mynd) hava fiskað væl í ár, og raksturin hevur hingið saman*
*Mynd: Karstin Vang*

**- Vit eru nøgdir við gongdina higartil í ár. Skipini hava fiskað væl, og raksturin hongur saman, sigur Tummas Christophersen, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ísfiskatrolararnir Vestmenningur og Fram eru fyrrverandi dalstrolararnir, Hádegisklettur og Stígarklettur, sum eru smíðaðir á Tórshavnar Skipasmiðju.

Skipini vórðu í síni tíð seld til Ný Sælands, haðani tey vórðu keypt aftur til Føroya.

Bæði skipini eru longd á Tórshavnar Skipasmiðju við 7,5 metrum sum ger, at tey taka meira. Hetta kemur ikki minst til góðar á gulllaksaveiðini í vertíðini.

### Hava fiskað væl

Reiðarin, Tummas Christophersen, letur rímiliga væl at gongdini higartil í ár.

- Skipini hava fiskað fyri einar 33 miljónir krónur. Heldur gongdin fram, kemur samlaða veiðivirðið at tátta í besta árinum, vit hava havt.

Hann sigur, at besta árið hjá Vestmenningi og Fram er 37 miljónir krónur.

- Nú vita vit sjálvandi ikki, hvussu verður tað, ið eftir er av hesum árinum. Seinastu tveir túrarnir hava gingið so óføra væl, men vit kunnu ikki vænta, at hetta verður gongdin til ársenda.

Tummas væntar tó, at samlaða veiðivirðið fer at tátta í besta árinum, tá vit nærkast ársskiftinum.

### Alt ger mun

- Tað hevur verið tungt at rikið ísfiskavinnu við troli í ár, nú oljuprísurin hevur verið so ómetaliga høgur. Nú er hann lækkaður nakað, og tað ger sjálvandi mun, men vit mugu ikki gloyma, at oljan framvegis er dýr.

Reiðarin sigur, at raksturin av Vestmenningi og Fram hongur saman við teimum 33 miljónum krónunum.

- Tað hevur gingið væl at fiska, og hetta er orsøkin til, at úrslitið er so frægt, sum tað er, sigur reiðarin.

Tummas Christophersen eigur meginpartin - ella 90% - av Vestmenningi og Fram. Seinastu 10% eigur JFK-Trol í Klaksvík.

Enn liggja ísfiskatrolararnir Nornagestur og Kolumbus í Vestmanna, og reiðarin sigur, at teir verða ikki loystir sum er.

- Oljuprísurin er framvegis ov høgur, og ivasamt er, hvussu tað hevði gingist at mannað skipini aftur, sigur hann.

hevði komið við einum lutfalsliga størri fiskiflota.

Tummas Christophersen vísir á, at við einum minni partrolaraflota fær fiskurin sjálvsagt betri frið – og gerst soleiðis helst eisini betri at fáast við.

- Roynir tú einsamallur á einum velduga stórum øki, hevur tað ivaleyst sínar fyrimunir fyri teir, sum eru har, men at samlaða veiðan ikki fer at minka við einum lutfalsliga lítlum fiskiflota, hevur búskaparfrøðingurin ikki rætt í, sigur reiðarin í Vestmanna.

Hann vísir eisini á, at Kári á Rógvi, tinglimur Sjálvstýrisfloksins, hevur samanborið trolið, sum rekur fisk við fjallmenn, sum reka seyð í rætt.

- Ein slíkur samanburður er púrasta burtur við. Seyðurin kann ikki flúgva, men fiskur kann saktans svimja upp um ta hædd, sum trolið, ið gongur eftir botninum og einar sjey metrar upp, hevur.

Tummas Christophersen sigur, at Kári á Rógvi hóskandi kundi samanborið trol og fisk við fjallmenn, sum reka krákur, sum hann tekur til.